# Pedagogur/hjálparfólk til Frítíðarskúlan í Vági

Søkt verður eftir avloysara fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi at byrjaða skjótast tilber í tíðaravmarkað starv.

**Starvið umfatar:**
At arbeiða 30 tímar um vikuna.

Vit ynskja, at tú dugir at skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum:
- Dámar væl at verða úti
- Ert kreativur
- Hevur gott foreldra- og starvsfólkasamstarv.

**Lønarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til leiðaran Sørin Richard tlf. 229482 ella kommunuskrivstovuna tlf. 373024 (Petry) .

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi **28. september 2007 kl. 12.00**. Merk umsóknina "pedagogur/hjálparfólk".

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

**Vágs Kommuna**
Mentunarnevndin

# Sosiala Deild hjá Porkeris- og Vágs Kommunu

Porkeris- og Vágs kommuna hava avgjørt at seta eina sosiala deild á stovn.

Deildin kemur at húsast í kommunuskrivstovuni í Porkeri.

**Avgreiðslan byrjar mánadagin 17. september 2007.**

Avgreiðslutíðirnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| mánadag- tórsdag: | 10-12 & 13-15 |
| onsdag: | 13-18 |
| fríggjadag | stongt |

**Sosiala Deild**
**Porkeris Kommuna** **Vágs kommuna**
Við Á 8
950 Porkeri
Tlf 37 36 04
Tlf 22 67 04
Fax 37 46 03
T-post: sosialadeild@email.fo

# Deksbátur til sølu



Vegna Sp/f Barkhellu í konkurs, verður deksbáturin m/b Leyvoy VN 232 hervið lýstur til sølu.

Báturin er bygdur í Tórshavn í 1920 og er tilfarið úr eik/furu.

Talan er um ein sokallaðan "sluppunga", bygdur eftir gomlum føroyskum handverksstandarum, og hevur báturin fiskiloyvi í bólkinum 5B.

Báturin verður seldur til hægstbjóðandi.

Áhugaði kunnu venda sær til Jóhan J. Lamhauge á tlf. 31 12 60 ella á teldupost jjl@lawfirm.fo

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4
110 Tórshavn, Boks 359
Tlf. 311260, fax 311261
e-mail: lawfirm@lawfirm.fo

*Tormóður Djurhuus • Jógvan Páll Lassen • Petur Even Djurhuus • Jógvan E. Ellefsen • Anna Dam • Ingi Højgaard Jóhan J. Lamhauge • Gunn Ellefsen • Mimi Steintórsdóttir*




**veitst tú ikki tað?**
Sosialurin

# Sløkkiliðsfólk til Fuglafjarðar sløkkilið

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir 1 leysum sløkkiliðsfólki M/K til Fuglafjarðar sløkkilið til setan 1. november 2007 ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skulu hava heilsuváttan, revsiváttan og stóra koyrikortið. Tó kunnu persónar, sum ikki lúka krøvini fyri koyrikorti, søkja størvini við teirri treyt, at hetta verður fingið til vega skjótast, um teir verða settir í starv.

Somuleiðis verður kravt, at umsøkjarar antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsfólkum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Nærri upplýsningar um starvið eru at fáa frá brunastjóranum William S. Askham á telefon 737800.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi **28. september 2007 kl. 15.00.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 07. september 2007*
**Fuglafjarðar kommuna**




# BRÚÐARKOYRING



Skalt tú hava eina serliga uppliving, so er at leiga ein bil hjá Havnar Bilasavni frá Sp/F Bilrøkt í Havn. Vel t. d. ein svartan Ford A frá 1930, ein hvítan Chevrolet frá 1931, ein bláan Chevrolet Skyline frá 1952 ella ein brúnan Jaguar frá 1978

**Ring til Bilrøkt á 588880**
www.bilrokt.fo bilrokt@bilrokt.fo